Skrivligur fyrispurningur

eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Páll á Reynatúgvu, løgtingsmaður

Svarari: Jørgen Niclasen, landsstýrismaður í fíggjarmálum

Evni: Dalstunnilin

Spurningar:

1. Nær fer arbeiðið viðvíkjandi Dalstunlinum í gongd aftur?
2. Verður arbeiðsplássið avriggað í løtuni?
3. Hvør er orsøkin til steðgin í arbeiðinum, hóast tøka játtan?
4. Er tað ein politisk avgerð at steðga arbeiðinum?
5. Hvørjar avleiðingar fær steðgurin fyri privatu samstarvsfelagarnar í verkætlanini, tá arbeiðið í Dalstunlinum liggur stilt?

Viðmerkingar:

Undirritaði, saman við Sirið Stenberg og Henriki Old, fyrrverandi landsstýrismanni, eiga upprunauppskotið um arbeiðið at gera smærru tunlarnar við einum almennum tunnilstoymi. Endamálið er at tryggja eina langtíðarraðfesting av Dalstunlinum, Tjørnuvíkartunlinum og Gjáartunlinum, so at hesir ikki detta niðurímillum í stóru raðfestingarkabalini hjá politisku skipanini. Ætlanin var eisini, at Fámjinstunnilin skuldi gerast eftir hesum leisti, men hann er seinni samtyktur í verklagslóg og verður gjørdur av privatum fyritøkum.

Arbeiðið við Dalstunlinum gongur væl, og hóast byggihátturin er sera bíligur, so gongur rættiliga væl at bora og spreingja, tá játtan er tøk. Higartil knappar 700 metrar av teimum 2200 metrunum í alt.

Eisini í inniverandi ári er peningur játtaður til Dalstunnilin, hóast í minna lagi. Men hóast játtan er tøk, er arbeiðið ikki uppafturtikið eftir jólafrítíðina. Hettar ørkymlar fólk, einahelst dalbingar, sum sjálvsagt ótolnast, nú arbeiðið ikki byrjar aftur sum ætlað. Tí hesar spurningar til landsstýrismannin.

Á Løgtingi, 26. januar 2022

Páll á Reynatúgvu